umhvørvisstovan

# Korttilfar í spillivatnsætlanini

**Henda vegleiðing er ætlað kommunum í sambandi við gerð av korttilfari til spillivatns-ætlanina sambært kunngerð nr. 111 frá 7. sept. 2009 um spillivatn.**

Korttilfarið skal á greiðan hátt vísa allar viðkomandi upplýsingar um verandi og ætlaðar spillivatnsskipanir.

Kort yvir verandi spillivatnsskipanir skulu í minsta lagi innihalda upplýsingar sambært punktunum 1-9 niðanfyri. Kort yvir ætlaðar spillivatnsskipanir skulu í minsta lagi innihalda upplýsingar og metingar sambært punktunum 1-6 og 8-9.

Upplýsingar, sum betri verða lýstar við orðum, kunnu setast aðrastaðni í spillivatnsætlanini.

## Upplýsingar á kortum

Kort skulu innihalda upplýsingar um:

1. **Bygnað, tilfar og reinsing**
   a. rørleiðingar, t.e. spilli- og regnvatnsleiðingar,
   b. tilfar, sum rør, brunnar og aðrir partar av skipanini eru gjørdir úr, og
   c. slag av reinsing, t.d. rottangar, brunnar, útskiljarar og reinsiverk.

2. **Slag av spillivatni**
   Allar íbindingar í spillivatnsskipanina, sum ikki kunnu metast sum vanligt húsarhaldsspillivatn, t.d. virkisspillivatn við tilskilan av virkisslagi.

3. **Nøgd av húsarhaldsspillivatni**
   Fyri hvørja útleiðing skal metast um tal á tilknýttum fólkum (persóns-ekvivalentum). Víst verður til Dansk Standard 440.

4. **Nøgd av virkisspillivatni**
   Fyri hvørja útleiðing skal metast um slag og nøgd av virkisspillivatni. Tilskilast skal um vatnnýtsla er íroknað.

5. **Útleiðingarstøð**
   Upplýsast skal, hvar rørleiðingar enda og dýpið á munnanum í mun til størstu fjøru. Um útleiðingar eru, sum ikki ganga út á sjógv, skal tilskilast, hvar útleitt verður (t.d. á, veit, gil og fjøru). Allar útleiðingar skulu á kortinum vera eyðmerktar við tali.

6. **Privat og vinnuligt virksemi**
   Kortið skal vísa økir við privatum og vinnuligum virksemi, sambært §12 í kunngerðini um spillivatn.



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

**7. Ár**
Upplýsast skal nær spillivatnsleiðingar, rottangar, reinsiverk o.a. vórðu løgd niður. Um árið er ókent, verður ein meting gjørd.

**8. Streymviðurskifti og vatnskifti**
Upplýsingar um streymviðurskifti og vatnskifti við útleiðingar skulu setast á kortini.

**9. Ampar og umhvørvisárin**
Kortini skulu vísa hvørjar útleiðingar eru lógligar og hvørjar eru ólógligar og á, hvar møguligir ampar og umhvørvisárin frá spillivatnsskipanini og útleiðingunum eru, ella fara at verða.

## Tøknilig krøv o.a.

Korttilfarið (geodatasettið), sum hoyrir til spillivatnsætlanina, skal vera sambært punktunum niðanfyri:

**1. Kortsnið**
Korttilfarið skal vera teldutøkt í vektorsniði, tað verið seg eitt nú Autocad, Microstation, ESRI ella Map-info sniði. Herumframt skal korttilfarið eisini latast inn í pdf sniði.

**2. Kortskipan**
Korttilfarið skal vera í eini alment viðurkendari kortskipan eitt nú FK89 ella UTM29.

**3. Metadáta**
Hesar upplýsingar skulu vera um korttilfarið:

a. nær korttilfarið seinast varð dagført, og
b. hvør hevur skrásett og nær.

**4. Annað**
Korttilfarið skal bert innihalda leiðingar og tøkni, sum eru viðkomandi fyri kunngerðina um spillivatn. Tilfarið skal vera lagbýtt, soleiðis, at ymsu lutirnir liggja í ymsum løgum.

Symbol og tekn skulu í størst møguligan mun vera í samsvari við Dansk Standard 432 “Norm for afløbs-installationer” og SBI-anvisning 185 “Afløbsinstallationer”.
Teknlýsing skal altíð gerast.

Fyrstu ferð útgivin: 18.09.2009
Seinast dagførd: 26.05.10
Útgava nr.: 2



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo